# Inga Falkvard Danberg farin


Inga Falkvard Danberg andaðist mikudagin í farnu viku. Bert 32 ára gomul

Farna vikan skuldi í mangar mátar vera ein gleðisvika fyri føroyskan hondbólt. Ein vika, har føroyameistararnir skuldu kjósast eftir enn eitt drúgt kappingarár.

Tað var tó sorgin, sum kom at seta síni tungu spor. Eitt av fremstu ítróttarfólkum okkara seinnu árini, Inga Falkvard Danberg, andaðist mikudagin eftir stutta sjúkralegu, bert 32 ára gomul.

At Inga nú skuldi geva upp ondina, kom at kalla sum eitt sjokk. Eisini hóast vit vistu, hvussu heilsustøða hennara var vorðin. Inga var altíð ein fightari, ein sum kundi bjóða øllum heiminum av og framvegis standa eftir sum vinnarin. Og tí er tað framvegis veruleikafjart, at hon kortini ikki skuldi vinna hendan seinasta dystin.

At lýsa eitt menniskja við einum einstøkum orði, er ongan tíð ein løtt uppgáva, men skal nakað einstakt orð setast á Ingu, so má tað vera, at hon var heil. Har var ongan tíð nakað, sum hon gjørdi hálvt. Tá hon var á ítróttavøllinum, so var tað av heilum hjarta. Til arbeiðis var hon heil, sum mamma og kona var hon ikki minni heil, men ikki minst var hon heil sum menniskja. Hon hevði so nógv at geva, og gav gleðiliga øllum, sum vildu hava, men ongan tíð fór eitt einasta petti av henni. Hon var altíð heil.

Harafturat var Inga eitt konubrot. At vera kvinna í dagsins samfelag, er kanska ikki altíð so lætt. Umframt at røkta tær uppgávur, sum kvinnan av siðvenju hevur átt, so er so nógv annað at takast við. Heldur ikki í hesum lá Inga eftir. Tvørtur ímóti skaraði hon framúr. Har var einki óført. Meistaraheiti í hópatali innan fleiri greinar siga sítt um ítróttaavrik hennara, og har bæði menn og kvinnur flest mundu setast eftir, so helt Inga áfram.

Um tað so var í Mykinesi eftir lundum ella við veðradjólingum, so var tað einki, sum kundi halda henni aftur. Heldur ikki veðrið. Hon fann sær nýggjar avbjóðingar og vann á teimum. Hon sáddi og hon heystaði, alt í senn, og hóast henni bert untist at gerast 32 ár, so mundi hon longu hava vunnið á fleiri forðingum, enn flestu okkara gera á okkara æviskeiði.

Inga varð borin í heim 9. oktober 1969. Barnaárini gekk hon í skúla á Argjum, og eftir hetta fekk arbeiði í musikkhandlinum hjá Simma. Innan ítrótt er hon fyrst og fremst kend frá hondbóltinum, har hon – hóast ættarbondini kanska bendi á nakað annað - alla tíðina var at síggja í bláa neistabúnanum. Tað kundi tó eins væl verið innan fótella flogbólt, at hon gjørdi seg galdandi, men tá hon at enda mátti velja, gjørdist hondbólturin vinnarin.

Fyri sløkum 15 árum síðani fann hon sín stóra kærleika í Finn Danberg. Saman fóru tey bæði niður at lesa ávíkavist í 1989, og undir lesnaðinum fingu tey døtrarnar báðar, Marjun og Nannu. Og henni so líkt, so hevði Inga samstundis stundir til at røkja hondbóltin, umframt at hon eisini tók skeið í blómubinding. Meðan tey vóru í Danmark – í 1992 – giftust Finn og Inga.

Í 1994 flutti familjan aftur til Føroya, og eftir at hon eitt skifti hevði starvast á vaskarínum á Landssjúkrahúsinum, var tað kanska ikki annað enn náttúrligt, at hon fekk starv hjá Thomas Dam Ítrótti, har hon seinni fór í læru, og varð avlærd á sumri 1998.

Fyrstu sjúkratekini fekk hon á páskum í fjør, tá hon fekk staðfest krabbamein í eitlunum. Líkt var tó til, at viðgerðin í Danmark kom í tøkum tíma, og í juni kundu læknarnir gleðiliga staðfesta, at hon var lekt. Sterk sum hon var, so vardi heldur ikki leingi, áðrenn hon hevði tikið alt uppaftur. Hon stóð aftur handan diskin í Miðbýnum, og í hondbóltinum gekk hon framvegis á odda, tá stig skuldu stríðast heim.

Í desember mánaði var tó greitt, at okkurt var, sum tað ikki átti at vera, og í januar gekk leiðin aftur til ríkissjúkrahúsið. Tá varð staðfest, at krabbin hevði breitt seg, og eftir at læknarnir bóru lemjandi dómin, untist henni bert knappar tveir mánaðir á foldum.

Sjálvur kom eg eins og so nógv onnur at kenna Ingu ígjøgnum ítróttin. Fyrst í B36, har eg eitt skifti eisini hevði ta fragd at vera venjari hjá henni. Ein fragd, tí tað fyri ein venjara má vera ein ynskidreymur at hava slíkan hugburð á liðnum, sum Inga dró við sær. Hon var ein vinnari. Tað næst besta var snøgt sagt ikki nóg gott. Í so máta mundi hon í mangar mátar vera ein fyrimynd fyri onnur, men soleiðis sá hon ongan tíð seg sjálva. Sum Finn so beinrakin segði mær, so vildi hon ongan tíð síggjast sum nakað serligt, men hon strembaði altíð eftir at gera nakað serligt.

Í núverandi starvi mínum sum ítróttaskrivari, hevur Inga eisini ofta verið mær ein hollur stuðul. Hóast henni ikki dámdi, at ov nógv varð gjørt burtur úr sínum persóni, so var hon altíð til reiðar at rætta eina hond, um tørvur var á eini dystarfrásøgn, eini samrøðu, ella hvat tað nú skuldi verið. Ongan tíð stóð á. Heldur ikki hóast tað onkun tíð kundi gerast nóg so seint á kvøldi, áðrenn telefonin kimaði.

Soleiðis var Inga bara. Hon vildi bara hjálpa øllum og vera øllum til vildar, og ikki eina tí einastu ferð var hon tann, sum sveik.

Og at fólk eisini hava verið takksom fyri tað, sum Inga hevur givið teimum, hevur ofta verið sjónligt. Ikki minst, tá ein stúgvandi full ítróttahøll stuðlaði tiltakinum, sum liðfelagar hennara í Neistanum skipaðu fyri, og risa stóra fylgi á seinastu ferð hennnara sunnudagin bar eisini somu boð.

Hóast missurin av Ingu kennist svárur hjá mongum okkara, so er hann tó størstur hjá tykkum, ið at kalla høvdu bygt lív tykkara kring hana. Serstakliga Finn og døtrarnar, Nanna og Marjun. Neyvan eru tað nøkur orð, sum kunnu hjálpa tykkum í sváru neyð tykkara. Tit hava mist ein dýrgrip í lívi tykkara, og hetta fær eingin givið tykkum aftur.

Ein hjálp kann tað tó vera, at mamma og kona tykkara nú hevur fingið frið. Hon er komin til eitt fjálgari stað. Og tá tit ein sælan dag eisini skulu av foldum, fer hon at standa fyri tykkum í himmalheiminum, tí finst ein slíkur, so er tað har, at Inga nú er farin.

*»Hini kæru har uppi, sum*
*tey veittra móti mær –*
*á, so tung, so tung var*
*skilnaðarstundin her!*
*Nú tey syngja og biðja*
*meg vælkomnan uppi har,*
*har sum sorg og skríggj og*
*pína ikki er«*

**Jákup Mørk**



Kyndil-VÍF21-31 (10-15):

# Gullið kom til høldar

**Uttan at tær veruliga spílaðu seg út, tryggjaðu VÍF-kvinnurnar sær eisini tvey stig í seinasta dystinum á árinum, og so var tíð til at taka ímóti gullinum**

HONDBÓLTUR – KVINNUR
*Jákup Mørk*


*Hóast tær langt síðani høvdu tryggjað sær gullið, so var fagnaðurin ikki minni av teirri orsøk, tá kappingarárið loksins endaði*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Gullgenturnar úr Vestmanna fingu ein skelk, tá tær fyri einari viku síðani púrasta óvæntað máttu lúta fyri VB. Hetta var fyrsta ferðin í tvey kappingarár, at tær máttu lúta fyri føroyskum mótstøðuliði, og hesin bletturin skuldi helst vaskast burtur, tá tær í seinasta dystinum vitjaðu Kyndil.

## Friðarligt

Bletturin varð eisini vaskaður burtur, tí uttan stórvegis hóvasták, so vann VÍF dystin, men tað tað var ongan tíð soleiðis, at tær veruliga spældu Kyndil niður og norð.

Kanska var tað orsakað av sorgini um, at ein av bestu mótstøðukvinnunum nú var farin, sum gjørdi tað, og vøkru orðini, sum vórðu borin fram undan dystinum høvdu kanska sítt at siga. Undir øllum umstøðum, so var dysturin leygardagin ein av tí meira friðarliga slagnum. Einki rok, fáir og alt annað enn ógvusligir nærdystir vóru at síggja, og einasta tekin um, at ein dystur veruliga gekk fyri seg, var helst máltalvan, sum so líðandi sýndi ein vaksandi mun millum liðini.

Dysturin sjálvur var tí lítið at skriva heim um, men hóast hetta, so kundu tær hjá VÍF fegnast, tá alt var liðugt. Meistaraheitið hava tær langt síðani fingið til høldar, men hóast hetta, so var gleðin sjónlig, nú seinasta brúkslið varð blást. Leikarar og venjari kundu gleðiliga hálsfevnast, og eftir at venjararnir høvdu fingið obligatoriska lufttúrin, kundi liðskiparin undir stórum fagnaði taka ímóti steypinum, sum VIF hevur vunnið annað árið á rað.

## Orkan størsti munurin

Og at gullmerkini hjá VÍF eru uppiborin, er tað neyvan nakar, sum kann sáa iva um. Liðið hevur snøgt sagt verið nógv hitt besta føroyska kvinnuliðið tey bæði seinnu árini, og tað er ikki av tilvild, tá mann vinnur greipuna tvær ferðir á rað.

Eitt, sum tó kann undra í so máta, er, at tein av høvuðsorsøkunum aftan fyri góðu úrslitini hjá VÍF er orkan. Tær hava snøgt sagt verið nógv betri fyri likamliga enn mótstøðuliðini, og tí eiga hesi ikki bert at bera seg undan við at siga, at VÍF er betri. Lat fara, um evnini ikki eru nóg góð til at bjóða oddinum av, men viðvíkjandi orkuni eru tað bert leikararnir sjálvir, sum gera av, hvussu langt hon røkkur, og her hevur VÍF eisini rokkið nógv longsta strekkið.

At tær so eisini hava leikarar, sum skara framúr, er ein onnur søga. At útlendsku- og avbygdakvinnurnar eru bulurin í liðnum, er heldur eingin loyna, men so við hava heimligu leikararnir eisini ment seg. Tær meira royndu, sum eru úr Vestmanna, eru allar í myndini til landsliðið, og í ungu Barbaru á Rógvi hevur felagið eisini ein heimligan leikara við eini bjartari framtíð. So hóast tað neyvan verður sama VÍF-liðið, sum komandi ár fer at stríðast á vøllinum, so skal eingin av mótstøðuliðunum ivast í, at mótstøðan úr Vestmanna framhaldandi fer at verða hørð. Sera hørð.


*Og so varð farið eftir venjaranum, sum sjálvsagt fekk ein ordiligan túr upp í loftið*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Dysturin í tølum

**Kyndil-VÍF 21-31 (10-15)**
Málskjúttar:
Kyndil: Lotte Sørensen 10(4), Marjun Tróndarson 3, Annika Ljósstein 2, Ann Hansen 2, Ann Mari Wang 1, Palma Petersen 1, Anja Johannesen 1, Jensia Petersen 1
VÍF: Ioana Rápa 11(2), Sóley Mikkelsen 5(1), Nicoleta Radu 4, Nicolina Eyðbjørnsdóttir 4, Barbara á Rógvi 2, Fríða Marjunardóttir 2(1), Alis Høghamar 2(1), Jórun Ludvig 1(1)
Brotskøst: Kyndil 5, VÍF 6
Útvísingar: Kyndil 5, VÍF 2

Dómarar úr Neistanum: Kristian Johansen & Hjalmar Petersen



12. mai kl. 15.00 í Ítrottarparkini

FCK - Brøndby

Úr Føroyum 9. mai kl. 20.40
Aftur til Føroya 13. mai kl. 08.55

Prísur: kr. 1.995,-
við í prísinum er atgongumerki, rundtúr við Toda í Parkini og ferðaavgjald.
Avmarkað nøgd.

ROCKSHOW 2002
EYEQ, DEN GALE POSE, TV2
COWGIRLS, SAYBIA
FCK og RockShow skipa fyri konsert í Fælledparken í Keypmannahavn11. mai.
Les meira á www.fck.dk

Sosialurin
í samstarvi við Atlantic Airways

ATLANTIC AIRWAYS
Tel. 34 10 40 · Fax 34 10 01
www.atlantic.fo